# Nøvn



## Til minnis um pápa mín
# Viggo Olsen
## av Argjum

Argir – var alt fyri teg pápi, tú sigur tað so væl sjálvur
Í yrkingi og sanginum »Kvøða til heimbygdina«:
»Argir eru okkara, hvar í verð vit fara. Tú er kærasta stað her á jørð«

Eg takki tær fyri alt, tú er fyri meg og mína familju
Takki tær fyri allan kærleika og umsorgan tú gav mær
Mangar túrar og løtur vit eiga saman
Tær løturnar eru varðar í minum lívi

»Lítli Viggo er mín verndareingil« – Brosið á tínum andliti lýsti upp.
Hann var títt lítla ljós á hesum myrka vetri
Síðsta tíðin her á fold var ikki løtt hjá tær
Eftur longri sjúkralegu orkaði tú ikki meir

Nú ljósið eftir langan vetur skyggir
Var tíðarljósið hjá tær pápi - runnið
Saknurin er stórur, nú tú er farin heim
Í Himmahøll har einglavakt tær tekur ímóti

Hvíl í friði góði pápi og takk fyri alt!
Lat Harran styrkja teg mamma og okkum
Ærað veri minni um mín elskaða pápa
Jesus ver hjá tær - Vit møtast ein dag í Himnahøll aftur

**Steinbjørn v/ familju**



†

Kistan við okkara elskaðu mammu, ommu,
langommu og vermammu

**Henny Andreasen**

fer úr Kirkjugarðskapellinum í Havn
týsdagin 22. mars kl. 14.

***Vegna tey avvarðandi***
**Hanna, Lis, Linda, Marne og Óla Hans**

Tey, ið vilja minnast Henny við blómum ella kransum, kunnu ístaðin lata eina gávu á konto í Eik banka.

## TØKK

Vit takka øllum hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá ið okkara kæra mamma, vermamma,
omma og langomma

**Anthonia Clementsen**

andaðist og fór til gravar.

Takk til prest fyri troystarrík orð,
takk til sangarar, berarar, kirkjutænarar
og til tey, sum hjálptu til við ervinum.

Eisini ein tøkk til heimarøktina í Sandoynni, sum var um mammu tey seinastu árini.

Takk øll somul

**Børnini**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Augusta Poulsen**
**Ljósá**
**ættað úr Sørvági**

andaðist fríggjakvøldið, 80 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum
í Runavík týsdag kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Bet-Kar við Ljósá
mikudagin kl. 14.00.

***Familjunnar vegna***
**Andrias, Sofus, Pól og Mirjam**

Tey, sum vilja minnast Augustu, kunnu lata Eysturoyar Røktar- og ellisheimi eina gávu, konto í peningastovnunum.

## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsem, tá elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Viggo Olsen**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Hera Tróndheim og
Berg D. Joensen fyri troystarrík orð.
Tøkk til urguspælara, kirkjutænara, sangarar, berarar og gravara. Takk til tykkum øll, sum á ymsan hátt hjálpti til við jarðaferðina og ervið.
Takk fyri blómur og peningagávur
til Diabetisfelag Føroya.
Ein serlig tøkk til starvsfólkini á A3 á Landssjúkrahúsinum, sum vóru um Viggo ta síðstu tíðina. Takk fyri alt tit vóru fyri hann.

***Familjunnar vegna***
**Sólveig, Sólbjartur, Eystein og Steinbjørn v/ familjum**